P/F reg. nr. 6115

# P/F NORDIKLÍV LÍVSTRYGGINGARFELAG

## ÁRSFRÁSØGN

FYRI

2015

Ársfrásøgnin fyri 2015 er góðkend á aðalfundi felagsins hin 30. juni 2016.
Fundarstjóri : Rune Nørregaard

# Innihaldsyvirlit


| | síða |
|---|---|
| Upplýsingar um felagið | 2 |
| Leiðslufrágreiðing | 3 |
| Leiðsluátekning | 4 |
| Átekning frá innanhýsis grannskoðan | 5 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 6 |
| Nýttur roknskaparháttur | 8 |
| Rakstrarúrslit | 10 |
| Fíggjarstøða pr. 31. december | 11 |
| Eginognsuppgerð | 12 |
| Notur | 13 |

## Upplýsingar um felagið

**Felagið**

| | |
|---|---|
| Navn: | P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag |
| Heimstaður: | Oknarvegur 5, Postboks 3048, 110 Tórshavn |
| Skrásetingarnummar: | 6115 |

**Nevnd**
Árni Ellefsen, Ægishædd 6, 100 Tórshavn
Jens Erik Jepsen Christensen, Maglevænget 7, DK-2920 Charlottenlund, Danmark
Turið F. Arge, Kongsgil 26, 100 Tórshavn

**Stjórn**
Rune Nørregaard, Undir Kongavarða 114, 160 Argir

**Grannskoðarar**
JANUAR, løggilt grannskoðanarvirki P/F

Arndis Poulsen
Innanhýsis grannskoðan

Ársfrásøgnin er góðkend á felagsins aðalfundi tann 30 juni 2016

fundarstjóri

## 5 ára yvrilit

Av tí at talan er um fyrsta roknskaparár felagsins eru eingi samanberingartøl.
Einki tryggingarvirksemi var í 2015 og tí er avmarkað, hvussu nógv lyklatøl kunnu vísast.

| | 2015 |
|---|---|
| **Rakstur** | |
| Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi f.e.r. í alt | 297 |
| Tryggingartekniskt úrslit | -297 |
| Ársúrslit | -243 |
| **Fíggjarstøða** | |
| Eginogn í alt | 29.757 |
| Ognir í alt | -29.757 |
| Ársúrslit | -243 |
| **Lyklatøl** | |
| Lyklatøl fyri konsolidering | |
| Solvensdekningur | 113,9% |
| Lyklatøl fyri renting | |
| Renting av eginogn áðrenn skatt | -1,0% |
| Renting av eginogn eftir skatt | -0,8% |

## Leiðslufrágreiðing

**Endamál**
Endamál felagsins er at reka pensjóns- og livstryggingarvirksemi.

Felagið fekk í skrivi tann 23. oktober 2015 frá Tryggingareftirlitinum loyvi at reka tryggingarvirksemið, men onki tryggingarvirksemið hevur verið í felagnum í 2015. Roknskapurin fyri 2015 er merktur av hesum.

**Ársúrslitið**
Ársúrslitið fyri 2015 vísir eitt hall á 243 t.kr. efter skat, sum nevndin mælir til, verður flutt til komandi ár.

**Framtíðarvánir**
Virksemið fer væntandi at geva eitt yvirskot í 2016.

**Týningarmiklar hendingar eftir roknskaparárslok**
Tað hava ikki verið serligar hendingar eftir roknskaparárslok til í dag, sum hava týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

**Ognarviðurskifti**
BankNordik eigur allan partapeningin í felagnum.

**Nevnd og stjórn**
Onnur leiðslustørv í føroyskum partafeløgum hjá nevnd og stjórn:

**Nevndin**

| | |
|---|---|
| Árni Ellefsen | Forstjóri BankNordik<br>P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag, nevndarformaður<br>P/F Skyn, nevndarformaður<br>Felagið Peningastovnar, nevndarformaður<br>Arbeiðsgevarafelagið fyri fíggjarstovnar, nevndarlimur |
| Jens Erik Christensen | P/F Trygd Tryggingarfelag, nevndarlimur |
| Turid F. Arge | P/F Skyn, nevndarlimur |

**Stjórn**

| | |
|---|---|
| Rune Nørregaard | P/F Trygd Tryggingarfelag, nevndarformaður<br>P/F Skyn, nevndarlimur |

## Leiðsluátekning

Vit leggja við hesum fram ársfrásogn fyri P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag fyri 2015. Ársfrásognin er gjørd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Tað er okkara fatan, at nýttur roknskaparháttur er hóskandi og tryggjar, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2015 og av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið frá stovnan 13. februar 2015 - 31. desember 2015. Samstundis er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin greiðir rættvísandi frá teimum viðurskiftum, sum frágreiðingin fevnir um.

Ársfrásognin verður løgd fyri aðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, hin 30. juni 2016

Stjórn:

Rune Nørregaard

Nevnd:

Árni Ellefsen
formaður

Jens Erik Christensen

Turið F. Arge

## Átekning frá innanhýsis grannskoðara

**Átekning á ársroknskapin**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag fyri roknskaparárið frá 13. februar 2015 – 31. desember 2015, við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn og notum fyri felagið. Ársroknskapurin er gjørdur eftir lóg um tryggingarvirksemi.

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við lógina um tryggingarvirksemi. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum

**Ábyrgd grannskoðarans**

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlógini. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði,sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til, fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31.12.15 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum frá 13. februar 2015 – 31. desember 2015 samsvarandi lóg um tryggingarvirksemi

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**
Vit hava, sum ásett í lóg um tryggingarvirksemi, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyri standandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, den 30. juni 2016

Arndis Poulsen
Grannskoðanarleiðari

**Átekning frá óheftum grannskoðarum**

**Til partaeigararnar í P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag**

**Átekning á ársroknskapin**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag fyri roknskaparárið frá 13. februar – 31. desember 2015, við leiðsluátekning, nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir lóg um tryggingarvirksemi.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársfrásøgnini**

Leiðslan hevur ábyrgd av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til, um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og harumframt eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, harundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til, fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum, fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2015 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum frá 13. februar – 31. desember 2015 samsvarandi lóg um tryggingarvirksemi.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Vit hava, sum ásett í tryggingarlógini, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyri standandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, tann 30. juni 2016

**Januar**
løggilt grannskoðanarvirki, P/F

Heini Thomsen
statsaut. revisor

## Nýttur roknskaparháttur

### Alment

Ársfrásøgnin hjá P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag er gjørd sambært Løgtingslóg um tryggingarvirksemi og kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldsfelagsskapum.

Inntøkur verða innroknaðar, so hvørt tær eru vunnar, herundir eisini virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis innroknaðir allir teir kostnaðir, ið viðvíkja árinum, herundir eisini av- og møguligar niðurskrivingar.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini vilja geva fyritøkuni fíggjarligar fyrimunir, og at virðið kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr fyritøkuni, og at virðið kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur tiknar við til útveganarvirði. Síðani verða hesar virðisásettar, sum greitt frá niðanfyri undir teimum einstøku postunum.

Innrokningar og virðisásetingar taka hædd fyri tapi og tapsváðum, ið vóru væntað, tá ið roknskapurin varð lagdur fram til góðkenningar.

Av tí at einki tryggingarvirksemi hevur verið í árinum, er nýttur roknskaparháttur avmarkaður til bert at fevna um teir roknskaparpostar sum hava eina upphædd.

### Samtaksviðurskifti og nærstandandi partar

Handil og tænastur millum feløg í samtakinum verða avgreidd til marknaðarprís ella á útreiðslunøktandi støði.

## Rakstrarroknskapurin

### Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi

Rakstrarkostnaðir fevna í 2015 bert um fyrisitingarkostnað. Fyrisitingarkostnaður fevnir um útreiðslur, sum eru nýttar í sambandi við fyrireiking til tryggingarvirksemi.

### Skattur

Skattur av ársúrslitinum er roknaður við støði í úrsliti áðrenn skatt, tillagað fyri ikki skattskyldugar inntøkur og útreiðslur. Útreiðsluførdi skatturin fevnir um aktuellan skatt av skattskylduga ársúrslitinum og javning av útsettum skatti

Avsetingin til útsettan skatt verður roknað við 18% av teimum tíðarbundnu avvikunum, sum stava frá, at inntøkur og útreiðslur ikki verða tiknar við í rakstrarroknskapinum og skattskyldugu inntøkuni í sama tíðarskeiði.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skylum.

## Nýttur roknskaparháttur

### Fíggjarstøðan

**Áogn**
Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Hædd verður tikið fyri væntaðum tapum.

**Útsettur skattur**
Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum

Útsettur skattur verður innroknaður við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi á statusdegnum. Útsett skattaáogn, herundir skattavirðið av framfluttum skattligum hallum, verða innroknað til tað virði, ognin væntandi kann avhendast fyri.

**Lyklatøl**
Hesi eru útroknað sambært ásetingunum í kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

| **Rakstrarroknskapur** | | **2015**<br>**tkr.** |
|---|---|---|
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt** | **0** |
| | **Úrslit av íløguvirksemi í alt** | **0** |
| | **Tryggingarveitingar fyri egna rokning í alt** | **0** |
| | **Broyting í lívstryggingaravsetingum fyri egna rokning í alt** | **0** |
| | Fyrisitingarkostnaður | 297 |
| | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi f.e.r. í alt** | **297** |
| | **Tryggingartekniskt úrslit** | **-297** |
| | **Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukku-tryggingarvirksemi** | |
| | Íløguúrslit av eginognini | 0 |
| | **Úrslit áðrenn skat** | **-297** |
| 2 | Skattur | 54 |
| | **Ársúrslit** | **-243** |

## Fíggjarstøða

| Ogn | 2015 tkr. |
|---|---|
| Onnur áogn | |
| Útsett skattaáogn | 54 |
| Tøkur peningur | 29.703 |
| **Onnur ogn í alt** | **29.754** |
| | |
| **Ogn í alt** | **29.757** |

| **Skyldur** | | |
|---|---|---|
| 1 | Eginogn | |
| | Partapeningur | 20.000 |
| | Yvirkursgrunnur við partabrævaútgávu | 10.000 |
| | Framflutt úrslit | -243 |
| | **Eginogn í alt** | **29.757** |
| | | |
| | **Skyldur í alt** | **29.757** |

| | 2015<br>tkr. |
|---|---|
| **Eginognsuppgerð** | |
| Partapeningur við ársbyrjan | 0 |
| Partapeningur | 20.000 |
| **Partapeningur við árslok** | **20.000** |
| | |
| Yvirkursgrunnur við ársbyrjan | 0 |
| Yvirkursgrunnur við partabrævaútgávu | 10.000 |
| **Yvirkursgrunnur við árslok** | **10.000** |
| | |
| Framflutt úrslit, við ársbyrjan | 0 |
| Framflutt ársúrslit | -243 |
| **Framflutt úrslit, við árslok** | **-243** |
| | |
| Eginogn, við ársbyrjan | 0 |
| Partapeningur | 30.000 |
| Framflutt úrslit | -243 |
| **Eginogn við árslok** | **29.757** |

**Partapeningur**
Samlaði partapeningurin hjá felagnum er eitt partabræv, sum P/F BankNordik eigur.

P/F Nordikív Lívstryggingarfelag verður innroknað í samtaksroknskapin hjá P/F BankNordik

Partapeningurin er ikki býttur í partabrævaflokkar.

| **Grundarfæfeingið og fæfeingiskrav** | |
|---|---|
| Grundarfæfeingið | 29.757 |
| Fæfeingiskrav | 26.119 |

# Notur

**1 Fyrisitingarkostnaður**

Onki starvsfólk hevur verið knýtt at felagnum í 2015 og tí er eingin starvsfólkakostnaður. Stjórn og nevnd hava ikki fingið samsýning í 2015.

Grannskoðari felagsins, Januar, hevur ikki fingið samsýning fyri grannskoðan í 2015.

| | 2015 |
|---|---|
| **2 Skattur** | **tkr.** |
| Úrslit áðrenn skatt | -297 |
| Skattur 18% | 54 |
| Javning í útsettari skattaáogn | 54 |
| **Skattur sambært ársfrásøgn** | **54** |
| **Avstemmað skattaupphædd** | **54** |
| **Útsett skattaáogn** | |
| Framflutt hall | 54 |
| **Útsett skattaáogn í alt** | **54** |

**3 Nærstandandi partar**

BankNordik eigur 100% av partabrøvunum í P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag og hevur tí avgerðandi ávirkan á felagið

Av tí at einki virksemi var í felagnum í 2015 var eingin samhandil við nærstandandi.

Við árslok vóru øll innlán felagsins í alt 29.754 tkr. innistandandi hjá atknýttum felag. Upphæddin varð ikki rentað í 2015.

## 4 Viðkvæmisgreining av fíggjarognum

| Hending: | Minsta ávirkan á grundarfæ-feingið í tkr. |
|---|---|
| Rentuhækking upp á 0,7 prosentstig | -208 |
| Rentulækking upp á 0,7 prosentstig | 208 |